## Umsóknarblað

Umsóknarblað til tænastu, er á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu.

Í umsókníni gevur borgarin loyvi til eitt sjálvvirkandi gjald av tænastuni.

Søkt verður á Vanganum, ella við at senda umsóknarblað til:

**Heilsu- og umsorganartænastuna**
Postboks 32 • FO-110 Tórshavn




Apríl 2024

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**TÓRSHAVNAR KOMMUNA**

Postsmoga 32
FO-110 Tórshavn
+298 302010
torshavn@torshavn.fo

**UPPLATINGARTÍÐIR**

Mánadag-hósdag 9.00-16.00
Fríggjadag 9.00-15.00

Leygardag og sunnudag stongt

UMSORGAN OG RØKT

# Dagtilboð til heimabúgvandi fólkapensjónistar





Kjarnuuppgávan hjá Heilsu- og umsorganartænastuni er við miðvísari umsorgan, tænastu, heimatænastu, heilsu- og sjúkrarøkt at stuðla borgaran soleiðis, at hann gerst virkin og vakin alt lívið.

Heilsurøkt og umsorgan er eitt týdningarmikið málsøki hjá Tórshavnar kommunu, sum vil ganga á odda og veita skjóta og góða heildartænastu.

UMSORGAN OG RØKT

# Dagtilboð til heimabúgvandi fólkapensjónistar

**Trý skipaði dagtilboð eru til aldrandi borgarar, sum ikki hava møguleika at luttaka í teimum tilboð sum Tórshavnar Kommuna annars bjóðar eldri borgarum, t.d Tilhaldið.**

Endamálið við dagtilboðunum er, at skapa møguleikar fyri, at eldri kunnu vera virkin, vera saman og vera hugbundin, og soleiðis vera við til at stuðla undir einum virknum og innihaldsríkum gerandisdegi.

Dentur verður lagdur á rørslu, kost, heilsustimbran og fyribyrging, og at allir borgarar skulu kenna seg sum part av felagsskapinum.

Hetta er eitt visiterað tilboð, og tí má søkjast um dagtilboð.

## Kostnaður

Gjald er ásett fyri tilboðið.

Gjøldini síggjast á torshavn.fo, á síðuni:
Brúkaragjøld í Tórshavnar kommunu

## Demens

Stjørnulon og Tjarnarlon eru tilboð til eldri fólk við demens. Dentur verður lagdur á trivnað og lívsgleði, hóast minni er viknað.

Vit gera mat, baka, gera fimleik, spæla kort, skipa fyri útferðum, binda og mangt annað.

**STJØRNULON**
Jøkulsstræti 4, tlf. 31 81 09 ella 21 81 09

Opið er kl. 9.00-15.00

Pláss er fyri 10 fólkum.

**TJARNARLON**
Stoffalág 84, tlf. 79 00 67

Opið er kl. 9.00-21.00
tó fríggjadag kl. 9.00-13.00

Pláss er fyri 12 fólkum dagin og 8 um kvøldið.

## Virkis- og venjingarstova

Virkis- og venjingarstova er á Lágargarði. Her hava fólk møguleika at hittast, hugna sær, og at gera ymisk ítriv sum gevur meining fyri tey. Tað kann t.d vera fimleik, gongutúrar í nærumhvørvinum, handarbeiði, dansur, sangur, hugnaløtur, bob ella dart.

**LÁGARGARÐUR**
Stoffalág 84, tlf. 21 07 14

| | | |
|---|---|---|
| Opið er: | Mánadag, mikudag og hósdag | kl. 9.00-16.00 |
| | Týsdag | kl. 11.00-16.00 |
| | Fríggjadag | kl. 9.00-13.00 |

Pláss er fyri tilsamans 60 fólkum, upp til 30 fólk ísenn.